# Renna saman í Funningsfirði




*Ein stóran part av sunnudegnum lá Pertinacia í Funningsfirði. Italienska kaðalskipið varð liðugt fyri einum ári síðani og kostaði 325 milliónir krónur*

**Nýggi FarIce kaðalin nøgtar allan tørv á kapasiteti og gevur neyðuga tryggleikan. Sunnumorgunin kom kaðalin á land í Funningsfirði, og harvið gjørdist 400 milliónа stóra verkætlanin sjónlig í Føroyum**

FARICE
*Orð:Heri á Rógvi*
*Myndir: Maria Olsen*

**Funnigsfjørður:** Sunnumorgunin lá eitt fremmandaskip í Funnigsfirði. Pertinacia stóð skrivað á skipinum, og ørindini hjá italienska skipinum vóru at leggja FarIce kaðalin.

Italienska skipið er 130 metrar langt og 24 metrar breitt. Skipið lastar 7.000 tons av kaðali. Skipið er ikki meira enn eitt ára gamalt, og byggikostnaðurin er á leið 325 mió. krónur.

### FarICE

FarIce er ein verkætlan, sum íslendingar og føroyingar í felag eru farnir undir. Endamálið er at økja um kapasitetin til umheimin hjá fjarskiftisfyritøkum.



*Tað er eitt strævið arbeiði at fáa ein tílíkan kaðal upp á pláss. Sunnudagin var eisini neyðugt at samskifta á nógvum ymsum málum*



*Kavarar hjálptu til við at fáa kaðalin at liggja sum hann skal*

Eisini gevur nýggi kaðalin ein størri tryggleika, tí nú eru tveir kaðlar, Cantat 3 og FarIce, soleiðis at tað altíð skuldi borið til at samskift við útheimin.

Júst hesin sami Cantat 3 kaðalin er álitið hjá føroyingum, tá tað snýr seg um at samskifta við umheimin. Hann varð lagdur miðskeiðis í nítiárunum, og hann verður framvegis álitið til desember mánað, tá ætlanin er, at nýggi FarIce kaðalin skal byrja at virka til fulnar. Umframt munandi størri kapasitet er munurin á FarIce og Cantat 3, at FarIce burturav er til Ìsland og Føroyar. Hin kaðalin var í stóran mun ætlaður Kanada, og Føroyar komu uppí. Ætlanin við hesum kaðalinum er at tryggja neyðugu samskiftisfortreytirnar komandi 25 árini.



**Fakta**

Prísur: uml. 400 mió. krónur.

Samlað longd: 1.400 km

Longd frá Funningsfirði til BU: uml. 200 Km.

Fjarskiftisorka við byrjan, Funningsfjørður - Dunnet bay: 20 Gbit/s

Fjarskiftisorka mesta, Funningsfjørður - Dunnet bay: 360 Gbit/s

Kaðalin verður grivin niður í havbotnin, umleið 1,5 metrar dýpi, har tað er gjørligt.

Kaðalin inniheldur tvey fipurpør.




*Her sæst, hvar nýggi kaðalin verður lagdur. Hann fer úr Dunnet Bay í Skotlandi til Seyðisfjarðar. Norðanfyri Føroyar verður hann skoyttur til Føroya. Á myndini sæst eisini, hvar Cantat 3 kaðalin er lagdur*

Kaðilin er í alt 1.400 km. Hann fer úr Dunnet Bay í Skotlandi til Seyðisfjarðar. Norðanfyri Føroyar verður hann skoyttur til Føroya og Funningsfjørð, har ein leggja italienarnir og hini ikki so nógv í, at tað er kirkjutíð. Skipið er dýrt at leiga, og arbeiðast skal, tá tað á nakran hátt ber til.

Tey lokalu eru ikki



*Arbeiðsmenninir hjá Føroya Tele fingu teirra sak fyri sunnudagin, tá føroyski parturin av 1.400 km. langa kaðalinum kom á land í Funnigsfirði*

nýggj støð er bygd. Tað kostar 400 milliónir at leggja kaðalin. Hesin peningur er býttur millum føroyingar og íslendingar. Føroyski parturin er tjúgu prosent ella einar áttati milliónir. Tá sagt verður føroyski parturin, so verður í veruleikanum hugsað um Føroya Tele. Hinir veitararnir í Føroyum eiga bert ein lítla part av føroyska partinum. Íslendska stjórnin eigur 37% av verkætlanini. Har verður mett, at FarIce hevur gjørt avtalu við italiensku fyritøkuna Pirelli um at leggja kaðal og keypa kaðal. Tað er ikki heilt ókeypis at leiga eitt tílíkt skip, ein stórur partur av teimum fýrahundraðmilliónunum í verkætlanini fer til at leiga skipið.

### Nýggir dagar

Hendan sunnumorgunin komin í serliga stórum tali. Men meira fólk enn vanligt ein sunnumorgun eru komin til Funningsfjørð. Hesi hava øll áhugamál í kaðalverkætlanini. Tað er ikki tí, at tað hendir serliga nógv. Arbeiðsmenninir hjá Føroya Tele eru komnir, og teir stríðast saman við italienarunum við at fáa lagt hendan góða kaðal niðan til støðina, sum er nógv nýggjasta húsið í Funningsfirði.

Men kaðalin er eisini nakað, sum eigur at vekja áhuga hjá fólki. Við honum byrjar ein nýggj tíð við fullkomiliga øðrum møguleikum at samskifta við umheimin. Gongur alt sum tað skal er fløskuhálsurin á uttanlands samskiftinum burtur í desember. Og prísirnir skulu gjarna eisini lækkað, men tað avger nýtslan.



*Føroya Tele hevur bygt eini hús til endamálið í Funningsfirði. Her fáast menn við at fáa kaðalin niðan á*